## Hólmgonga um politikk og átrúnað í Miðlahúsinum

Í sambandi við nýggja essay-savnið ”Krossvegir” verður kjaktiltak í Miðlahúsinum hóskvøldið kl. 20 um kristindómsins leiklut í føroyskum politikki. Hvønn leiklut skal kristindómurin hava í føroyskum politikki? Hesin spurningurin verður snúningsdepilin undir kjaktiltaki í Miðlahúsinum hóskvøldið kl. 20, tá Kristianna Winther Poulsen, Sjúrður Skaale, Rúni Rasmussen og Bill Justinussen fara at kjakast um hendan spurning. Undir tiltakinum fer Hanus Johansen at spæla og syngja. Tiltakið verður hildið í sambandi við nýggja essay-savnið ”Krossvegir”, har fimtan føroyskir høvundar skriva um viðurskiftini millum átrúnað og politikk í Føroyum, og sum Páll Holm Johannesen og Heini í Skorini hava ritstjórnað. Tey trý Kristianna Winther Poulsen, Sjúrður Skaale og Rúni Rasmussen eru millum teir fimtan høvundarnir í bókini, meðan fjórði luttakarin í panelinum hóskvøldið, Bill Justinussen, situr á tingi fyri Miðflokkin.

# ongantíð verið størri



Fiskasølan vórðu løgd saman, og seinnu vórðu bæði feløgini seld undir einum. Vit hava brúkt nógva orku upp á at trukturerað okkum, og seinni hevur felagið eisini keypt fleiri skip. Herfyri komu so eisini nýbygningarnir úr Spaniu, sum vóru 10 mánaðir seinkaðir. Alt hetta hevur kravt nógv av hvørjum einstøkum av okkum, men vit eru sera spentir upp á framtíðina.

Stjórin í Faroe Seafood væntar ikki, at vit fara at síggja broytingina fyrr enn í 2008, men hann hevur vónir um, at komandi ár samanlagt fyri samtakið fer at standa upp og niður rakstrarliga. Tað verður í hesum ári, at vit fara at fáa eina betri mynd av samlaða virkseminum hjá felagnum.

- Vit hava nógv góð og dugnalig fólk í fyritøkuni, bæði í leiðslu og á gólvinum, og vit hava góðar og raskar skipamanningar, sum duga síni ting. So, vit eru ógvuliga spent upp á tíðina, sum liggur fyri framman, sigur hann.

### Stórt skipavirksemi

Faroe Seafood eigur nú seks partrolarar, Bak og Stelk, Rók og Lerk og síðan teir nýggjastu, Heyk og Falk, ið komu sum nýbygningar til landið herfyri. Aftrat hesum eigur felagið 2/3 av einum øðrum pari og helmingin av einum djúpvatnstrolara.

- Vit hava soleiðis umleið 90 mans, sum sigla við okkara skipum og eini 700 fólk, sum arbeiða á okkara sjey virkjum kring landið, øll tó ikki í fulltíðarstarvi.

Heykur og Falkur eru farnir royndartúr, og nú er bert at vóna, at skipini fara at roynast, og at tey ikki renna seg í alt ov nógvar byrjunartrupulleikar.

- Vit hava nú fleiri nýggj tól, og vit hava samstundis nøkur størri og betri ”íløt”, sum kunnu fiska í at kalla øllum veðri, sigur hann.

### Stór ábyrgd

Meinhard Jacobsen ásannar, alt hetta virksemi leggur eina stóra ábyrgd á felagið.

- Vit eru til reiðar at gera alt, sum liggur í okkara makt fyri at liva upp til hesa ábyrgd. Vit hava gott mót um, at okkara virksemi í fyrsta lagi kemur at tæna teimum, sum eru við í hesum og føroyska samfelagnum sum heild. Alt hetta virksemið við virkjum og skipum gevur okkum fleiri møguleikar, sum vit ikki áður hava havt, sigur stjórin í Faroe Seafood.




*- Vit fara ikki at síggja veruligu broytingina fyrr enn í 2008, tá ið vit vænta, at raksturin hjá samtakinum fer at standa upp og niður. Tað verður í hesum ári, at vit fara at fáa eina betri mynd av samlaða virkseminum hjá felagnum, sigur stjórin í Faroe Seafood*



*- Vit hava nógv góð og dugnalig fólk í fyritøkuni, bæði í leiðslu og á gólvinum, og vit hava góðar og raskar skipamanningar, sum duga síni ting. So, vit eru ógvuliga spent upp á framtíðina, sigur Meinhard Jacobsen*